# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ymisk signal

Signalfløggini í marknaðarpolitikkinum eru so smátt við at verða skift og røringur er við at koma í ES politikkin. Heilt síðan Danmark gjørdist limur í Felagsmarknaðinum, sum ES tá nevndist, hevur ein stórur meiriluti á løgtingi verið ímóti føroyskum limaskapi. Hugburðurin hevur verið neiligur og hesin hugburður er so eisini ein orsøkin til, at vit bert hava eina handilsavtalu við ES, meðan okkara kappingarneytar hava avtalur, ið geva møguleikar fyri breiðum samstarvi á øllum økjum. Við tíðini er hugburðurin broyttur eitt nú við, at okkara granskingar- og útbúgvingarumhvørvi kennir seg stongt úti frá einum sera mennandi og gevandi samstarvi, einum samstarvi, sum hópur av londum uttan fyri ES sleppa at taka lut í.

Seinastu árini hevur ein ávís hugburðsbroyting gjørt seg galdandi, og vit hava fingið tvær serfrøðingafrágreiðingar við greiningum og tilmælum um eitt framtíðar føroyskt tilknýti til ES. Meira er ikki hent uttan, at tað eydnaðist løgmanni undir seinastu samgongu at fáa ES at góðtaka Føroyar sum samstarvspartnara innan granskingarsamstarv. Eftir stendur samstarvið innan útbúgvingarøkið, og í skrivandi stund vita vit ikki, hvørja lagnu hetta mál fær. Samstundis má ásannast, at undanfarna landsstýri vísti ógreið signalfløgg, eftirsum hon uttanríkispolitiskt legði alla orku í EFTA limaskapin. Tað hevur ikki verið greitt fyri almenninginum, hvørjir fyrimunirnir við møguligum EFTA limaskapi eru, tí eitt nýtt EFTA land fær ikki av sær sjálvum somu ES fyrimunir sum ”gomlu” EFTA londini. Verandi landsstýrissamgonga hevur boðað frá nýggjari marknaðarpolitiskari kós í ES málinum, samstundis, sum samgongan fegnast um, at tað nú tykist sum gongd er við at koma á EFTA málið.

Her veittra sostatt ymisk signalfløgg, ið geva andstøðuni høvi at finnast at marknaðarpolitikkinum. Edmund Joensen fyrrverandi løgmaður, setur fingurin á eyma punktið hjá landsstýrinum. Hann fegnast um nýggja europapolitikkin, samstundis sum hann finst at strategiini. Sambært Edmundi eiga vit at nýta ”danska kortið” sum atgongumerki, meðan landsstýrið tykist vilja vinna okkum nærri tilknýti til ES uttan danska hjálp. Hetta er vorðið eitt klassiskt dilemma hjá einum landsstýri við tjóðskaparligari yvirvág. Søtur er sjálvgivin biti, men hinvegin hevur Edmund kanska rætt í, at tað fer at at ganga skjótari við danskari hjálp. Landsstýrið má nú heysa greiðari signalfløgg. Fólk og vinna hava krav uppá at fáa at vita, hvat samgongan ætlar. Ætlar hon EBS avtalu gjøgnum bakdyrnar hjá EFTA, ella ætlar hon limaskap, sum okkurt kundi bent á, ella droymir hon um eitthvørt heilt triðja, sum enn ikki er greitt. Vit hava ikki ráð at bíða leingi afturat eftir hesari avgerð, tí sum øllum kunnugt, tekur tað ár at koma fram til eitt nýtt ES tilknýti uttan mun til form ella innihald.

**Sosialurin**

## Politikaraskúlin

**KÁRI Á RÓGVI**
løgtingsmaður



Vit royttu á trøðni hjá Hans Paula á Kelteigum í Sumba, nakað omanfyri Rubbikeldu, eystanfyri Stovusvingið, tá ið kringvarp Føroya for så vidt angår útvarpið bar tey tíðindi, at Jenis av Rana hevði tykta og agað okkum í andstøðu í uttanlandsnevndini fyri at hava sagt opið og ærliga, hvat vit hildu um sonevndu grønlendsku sjálvstýrislógina. Samstundis varð sagt frá ferð nevndarinar til New York – uttan at nevnt var, at Kári á Rógvi vildi ikki við á hesa ferð.

Mær rann til hugs einasta avgjørda vallyfti mítt. Einastu ferð nakar veljari vendi sær til mín við orðunum “eitt mást tú lova mær,” hugsaði eg, “man vera okkurt loyvi ella kanka lán er onkrum almennum grunni,” men hesi segði bara púra álvarsamur: “tú mást lova mær ikki at fara á politikaraskúla og blíva sum hinir.”

**Siroppur á fingrunum**
Václav Havel, skald og forseti kekka, hugleiddi einaferð um hetta at vera fólkavaldur. Tú situr við ta stóru tunnuna av siroppi og skalt býta út. Hugdjarvur og rættlatin drýpur tú oysuna niður og letur hesum og hasum góða endamálinum av landsins tilfeingi. Men sohvørt tó oysir, heftist meiri siroppur uppí sleivini, og nakað rennur um fingrarnar, og fyrr ella seinni sleikir tú tær at fáa klistrið burtur. Siroppur er søtur, og tú sleikir tær oftari um fingrarnar, og áðrenn tú varnast, oysir tú tær sjálvum og endar við høvdinum niðri í tunnuni við søtmeti.

Tingfólk í Føroyum hava sera vánaligar umstøður at arbeiða undir. Vit kunnu siga, at sleivin er ov stutt, sprekkut og formáar sær lítið afturímóti oysunum hjá landsstýri og embætisverki, tá ið umræður at raðfesta fæ landsins. Men treyðugt so, okkurt søtmeti rennur niðureftir skaftinum; serliga er framíhjárættur hjá tingfólki at sleppa at ferðast annaðhvørt ár við hvørji løgtingsnevnd. Sama ger hvagar og hví, vit eiga rætt at ferðast, og ferðast skal áðrenn høvi gleppur av hondum. Formansskapurin fór til andaliga føðiland okkara at halda fund; og turvelvandi bragdið í siroppinum fornoktaði seg ikki. John Johannesen, ið byrjaði karrieruna sum krossfarandi tíðindamaður, gjørdist nú firtin, sjálvsat ikki egna, men frúunar og helst eisini fólksins vegna. Tá ið fólksins umboðsmaður fær onkra bølluta fyri at hava (umenn óviljað) seinkað fólki heim at hyggja at EM-finalu, ja so er tað jú sjálvt fólkið, ið verður háað, og sjálvar Føroyar, ið firtnar taka seg úr flogfarinum, krevja skaðabøtur, og kæra sína neyð fyri Norðlýsi og fjølmiðlanevnd.

Mína báðar nevndir, uttanlandsnevnd og fíggjarnevnd, hava elvt mær stórt vónbrot. Samlaða tekstmongdin, vit hava skrivað í álitum man vera minni enn framleiðslan hjá skúlanæmingi. Serliga Jenis av Rana avmarkar seg vanliga til at siga seg vera samdan við samgonguni, og onkuntíð biða skrivstovu orða okkurt hissini tómgangsprát – sum nú í málinum um sjálvstýrislógina.

Men, vit hava rætt at ferðast. Mær stóð í boði at fara til Kulusuk og New York.

**Felagar tit pjøkan takið**
Veljarin á sinni meinti helst, at politikaraskúli er av tí ónda, um hann ger vanlig hampafólk til pamparar. Men í roynd og veru er sanniliga brúk fyri skúling. Hvør veit akkurát, hvør munur er á lógabundnari játtan og stuðulsjáttan, ella hvat er munur á heimildarlógini og heimastýrislógini? Harumframt er gott at menna telduførleika, málkunnleika – ella fatan av sambærligum viðurskiftum í øðrum londum.

Í so máta var eg sjálvur sera fegin um mínar ferðir vestur um hav, ikki minst tá ið Michael Reveal brúkti fleiri vikur at leggja til rættis ferð hjá grundlógarnevndini, har vit hittu alt frá tingfólki av Hawaii til hægstarættarforsetan í Nebraska til akademiska dekanin á Kennedy School of Government á Harvard, og vit fingu íblástur til alt frá tingskipan til mannarættindi. Er nøktandi endaømál við ferðini, er hon løgd til rættis av eins lystum, og kemur nakað burturúr, ber til at tosa um at ferðast uppá ‘landsins besta.’

Men hjá uttanlandsnevndini var fyrireikinginin ein krímsjúkur teldupostur til umboðsmann Føroya í Danmark, sum sendi annan teldupost til sendistovuna hjá Danmark í ST, sum svaraði at har lá ikki so væl fyri. Ætlanin var bert at hitta onkran, og nevndi uttanlandsnevndin í fyrispurningi sínum millum annað avkolonialiseringsdeildina hjá ST. Júst tann skrivstovan er tó ikki serliga viðkomandi, bæði tí Føroyar ongantíð hava verið koloni, heldur dynastiskt tilknýtt atland, men eisini tí vit báðir Sjúrður Skaale, limir í uttanlandsnevndini, hava verið á hesi skrivstovu og enntá skrivað eina bók um ta og aðrar vitjanir.

Nevndin kundi fyrrenn ikki byrja við at lisið bókini og síðani lagt sínar ætlanir.

Heldur átti uttanlandsnevndin at hitt grønlendingar á máli um teirra dáragerð at binda seg at illa smíðaðari sjálvstýrislóg; ella at hon fór at vitja sendistovur okkara at vita, hvat tær fáa burturúr – havi ongantíð enn hoyrt nakran fyrilestur um avrikini hjá føroyska diplomatinum, tó at tey óivað eru ótald.

Men fullkomiliga ósannførandi skuldi fíggjarnevndin til Eysturgrønlands, og uttanlandsnevndin skuldi bara hitta onkran um okkurt í New York, enntá við frúunum í ferðalagi.

**Tróndardagar**
Tann ringa skúlingin av føroyskum tingfólkum er ikki minst galdandi fyri politisku søgu okkara. Tingfólk munnu flestu vera illa skúlaði í fornnorrønum og tí ikki hava lisið á gamla málinum tær søgurnar, íslendingar skrivaðu um politikk okkara. Vanliga fatanin er tí ov einføld, at Tróndur var heiðin, Sigmundur kristin, Tróndur fullveldismaður og Sigmundur sambandsmaður.

Veruliga søgan er hels tíverri nógv nærri dagsins veruleika. Báðir høvdu tikið við kristni, men “denturin lagdur á eitt og á annað;” teir vóru skyldmenn men lógu tó hvørjum øðrum eftir lívinum; flokkar teirra gjørdu viðhvørt samgongu (sum við giftu teirra Leivs og Tóru), men slitu í ótíð og lupu so á aftur.

Ikki var frítt henda góðverðursdag í Sumba, á fjalli við bragdarhugaðun alva eins og Brestir á sinni, at eg væntaði okkurt slysálop at løna mær aftur, at eg vildi ikki á politikaraskúlan.

Nú á døgum koma tey úr útvarpinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.